# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Sámal Jákup Hansen, skipari:

## Havt sína seinastu vakt hjá Strandferðsluni

**Sunnudagin 31. oktober sigldi Sámal Jákup Hansen, skipari á strandfaraskipinum Dúgvuni, fyri seinastu ferð um Leirvíksfjørð, eftir at hava siglt sum skipari hjá Strandfarskipum Landsins í samfull 34 ár**



*Sunnudagin 31. oktober 2004 sigldi Sámal Jákup Hansen fyri seinastu ferð sum skipari við Dúgvuni um Leirvíksfjørð. Myndin er tikin á brúnni seinasta arbeiðsdagin*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin var ein lítil samkoma umborð á Dúgvuni, tá Kristian Davidsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, saman við Regini Vágadal, rakstrarleiðara, og Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara, hildu røður og takkaðu Sámal Jákupi fyri tíðina.

Sunnudagin segði manningin farvæl við ein góðan døgurða umborð á Dúgvuni.

Sámal Jákup er 67 ára gamal og klaksvíkingur. Hann tók stýrimansprógv í 1960 og skipsføraraprógv í 1967.

Hann sigldi við skipum hjá Kosangass frá 1960, til hann fekk fekk starv hjá Strandferðsluni í 1970.

Fyrst sigldi hann við »Pride« til 1972, tá hann bleiv skipari á gomlu »Ternuni« og frá 1980 við nýggju »Ternuni«. Í 1982 bleiv hann skipari á »Teistanum«, har hann var í 14 ár.

Síðan 1996 hevur Sámal Jákup fyri tað mesta siglt um Leirvíksfjørð við Dúgvuni.

Hesi árini hevur hann eisini havt ymiskar aðrar uppgávur, t.d. hevði hann uppsýn við vaktarskipinum »Tjaldur« ið varð bygt í Svolvær í Lofoten, og var hann við til at sigla skipið heim í 1976.

Sámal Jákup sigur, um hesi árini hann hevur siglt sum skipari, at tað hevur verið ein spennandi og innihaldsrík tíð, serliga árini við »Teistanum«, teir sigldu t.d í Karibien og í Álandi, og millum Åbenraa og Echenførd í Týsklandi, eisini avloystu teir á innanlandsrutum í Danmark, millum Ebeltoft og Sjællands Odde og millum Grenå og Hundested.

Hóast honum hevur dámt væl, gleðir Sámal Jákup seg til at kunna taka sær av løttum fyrstu tíðina. Hann hevur annars nokk at takast við, hús, neyst og bát, alt skal haldast við lika.

Sámal Jákup er sonur Linu, f. Johansen, vanliga nevnd Lina í Ánunum, hiðani hon var ættað, og Thorvald Hansen, vanliga nevndur Thorvald í Ídni, í Klaksvík.

Hann er giftur við Hannu, f. Simonsen, úr Klaksvík, dóttir Veru, f. Petersen, úr Keypmannahavn, og Símun Simonsen, vanliga nevndur Símun á Gørðum, í Klaksvík.

Hanna og Sámal Jákup eiga fýra børn, Thorvald, sum býr í Klaksvík, Vivian, Lina og Símun, búgva øll í Danmark. Ommu- og abbabørnini eru 8 í tali.

Hósdagin fara Hanna og Sámal Jákup við Norrönu til Danmarkar at vitja familjuna.



*Manningin sigur farvæl við á skiparan á teirra vakt, aftara rað f.v. Pauli Magnussen, yvirstýrimaður, Sámal Jákup Hansen, skipari, Debes Christiansen, dekkari, John Jacobsen, maskinstjóri, fremra rað f.v. Regin Kunoy, 1.maskinmeistari, Durita Joensen, kioskdama, Jógvan Joensen, 1. stýrimaður, og Símun Dam, dekkari*

*Mynd: MF Dúgvan*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á 90 ára degnum við gávum, blómum, fjarritum, kortum og telefonuppringingum.

Og ein hjartans tøkk til børn, svigarbørn, abba- og langabbabørn, sum gjørdu alt so hugnaligt fyri meg við sangi og talum.

Harrin signi tykkum øll.

**Heilsan Jóhannes Miðberg, Vestmanna**

†

**Leivur Andreassen**
vanliga kallaður Leivur í Ullvøruhúsinum

andaðist í heiminum 30. oktober, 81 ára gamal.
Kistan fór úr heiminum og oman í Ebenezer
kl. 18 mánakvøldið 1. november.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer
týsdagin 2. november kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Kirstin, Maria og Jens**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Minningarhald teirra sjólátnu:

## Sorg er altíð persónlig og sker djúpt

**Mánadagin 1. november var minningardagur teirra sjólátnu hildin kring landið. Minningarhald var eisini á Sjómansheiminum í Havn og løgmaður legði krans við minnisvarðan í viðalundini**

MINNINGARHALD



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, leggur krans við minnisvarðan í viðarlundini*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Alla halganna dag, 1. november, vóru minningarhald hildin við teir ymisku minnisvarðarnar og í kirkjum og samkomuhúsum kring landið.

Eins og undanfarin ár var samkoma á Sjómansheiminum í Havn, har Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Jóannes Fonsdal, prestur, hildu minningarrøður.

Kl. 20 var mánakvøldið varð minningargudstænasta í Havnar Kirkju.

Vit prenta her røðuna hjá Jóannesi Eidesgaard, løgmanni:

Tað eru tveir dagar í menniskjalívinum, sum fram um aðrar hava verið mintir. Tann fyrri er navnadagurin – í kristnari tíð dópsdagurin.

Ikki fyrr enn eitt menniskja hevði fingið navn, var tað satt menniskja á tann hátt, at tað var vorðið eitt EG, sum livdi andlit til andlits við onnur menniskju – eitt TÚ.

Og tann seinni er deyðadagurin. So langt aftur í tíðina, vit kunnu koma, hevur deyðin verið umgyrdur av ymiskum siðum. Tað er helst ongastaðni, at deyðin ikki hevur havt sínar siðir. Leita vit aftur í ta elstu kristnu tíðina, so vita vit, at fólk savnaðist við grøvina og til dømis tendraðu ljós ella á onkran hátt markeraðu deyðadagin.

Á Karla Magnusar tíð var vanligt at halda 1. november sum allahalgannadag. Frá ár 1169 hevur dagurin verið hildin sum ein av teimum stóru halgidøgunum, tá so at siga allir minningardagar um tey deyðu, vóru savnaðir í ein stóran dag.

Eftir trúbótina datt dagurin so við og við burtur sum halgidagur, men hann livdi framvegis í mannaminni. Og júst mannaminnið hevur eyðkent føroyingin. Mentan okkara í gleði og sorg er munnborin ætt eftir ætt, øld eftir øld.

Tey, ið minnast krígsárini og fylgjurnar av teimum, minnast skip og manningar, ið ongantíð komu aftur.

Tey yngru hava ikki upplivað kríggið, men tey hava hoyrt lagnusøgur. Hetta tíðarskeið og onnur við eru fest á blað fyri eftirtíðina júst við hesum endamáli – at minnast – eins og vit gera í dag á minningardegi teirra sjólátnu.

Krígsárini settu so mikið djúp spor í føroysku fólkasálina, at eftir krígslok varð avgjørt at minnast teir, sum fórust í yrki sínum á sjónum. Tá varð avgjørt at taka uppaftur tann gamla minningardagin fyri teimum deyðu, og tað var so gjørt, er mær sagt, í 1949.

Tjóð okkara hevur tveir almennar flaggdagar, har flaggað verður á hálvari stong, langa fríggjadag og allahalgannadag. Annar syrgir Drottin Mikla og hin syrgir fólk okkara, ið fórst so bráddliga.

Runt um landið bera minnisvarðarnir sítt tigandi vitni um lagnu á sjónum, um skip, sum fórust og menn, sum ikki komu aftur.

Hesi súmbolsku tjóðarvirði, flaggið, minnisvarðarnir og allahalgannadagurin savnar tjóðina í tignarligari samkenslu við øll tey, ið hava mist.

Hesi 55 árini hevur bert eitt ár skarað framúr, at eingin maður er farin. Heldur hava vanlukkurnar myndað henda dag, og av teimum stóru kunnu her nevnast Stella Argus, sum fórst í 1957 og Sjóborgin, sum fórst so nýliga sum í 1998.

Tó at ein vanlukka kann fevna um fleiri ella færri mans, so kennist hon altíð hørð, har hon rakar. Tí sorg er altíð persónlig, hon sker djúpt í merg og bein og setur merki eftir seg fyri lívið hjá teimum avvarðandi.

Tað er í hesum skifti millum gleði og sorg at Jákup Dahl hevur týtt sálmin hjá Kingo: »Onga tíð er frá mær váði«, har hann í seinastu ørindunum sigur:

*Nú í kúri, nú í kæti,*
*nú á grúgvu, nú í sæti,*
*oftast stór mín óró er,*
*altíð trúgvin ugga ber.*

*Sorg og gleði saman fylgjast,*
*Søtt og beiskt er bland mær lutast,*
*blandað mær í lívsins skál,*
*slíkt er alt mítt ævimál.*

*Gráti eg á nátt og degi,*
*hjálp mær Jesus, at tín gleði*
*yvir synd og sorgum má*
*altíð yvirlutan fá.*

Tað er hetta beiska blandið, ið er felags lagna okkara og samanhald okkara.

Aftur í ár hevur sorgin rakt. Aftur í ár hava vit mist á sjónum. Aftur í ár sita avvarðandi eftir í sorg og sakni um teir, ið ikki vunnu upp land.

Nærleikin við ætt og vinir og nærumhvørvið í Føroyum skapa grundarlag undir eini fólkasál, ið ber byrðar hvør hjá øðrum, ið samkennir og syrgir saman við teim syrgjandi.

Vit kunnu ikki syrgja fyri tykkum, sum hava mist; men Føroya fólk vil standa saman við tykkum og vísa sín stuðul við at geva okkum í løtuni saman við tykkum.

Við hesum orðum vil eg vegna Føroya landsstýri og alt fólk okkara vísa tykkum, ið mist hava, djúpastu samkenslu í stóra sakni og sorg tykkara.

Í virðing reisa vit okkum og minnast í tøgn teir farnu:

*Gudmund Isfeld, Tórshavn, 65 ára gamal, fórst við bátinum Hellu í Nólsoyarfirði 7. januar 2004*

*Jens K. Justinussen, Leirvík, 54 ár, druknaði á Havnarvág 7. februar 2004.*

*Hans Olaf Johannessen, Klaksvík, 50 ár doyði 1. mars 2004 umborð á »Kvikki«*

Friður veri við minni teirra.



*Mynd: Jonhard Hammer*



*Jóannes Fonsdal, prestur, við minnisvarðan*

*Mynd: Jonhard Hammer*

### Dagurin

**2. oktober. Alla sálna dagur.** Umleið ár 1000 kemur í tann siður at halda minningardag fyri øll, sum farin vóru, og als ikki bara fyri halgimennini